# Samandráttur
# – ein framtíðar mynd



Í hesum samandráttinum verður ein framtíðarmynd av Føroyum í 2015 málað. Myndin er málað við høvuðsstrokum úr uppskotunum til mál fyri grundarsteinarnar, sum mynda hvør sítt samfelagsøki í Visjón 2015. Grundarsteinurin sjálvstýri skilir seg burturúr samanhanginum og stendur tí fyri seg.

Strokini eru breið og yvirskipað og fara ikki niður í smálutir, teir eru útgreinaðir í grundarsteinunum. Samandrátturin veitir hinvegin eitt yvirlit yvir, hvussu samfelagið er hugsað broytt til tað betra, soleiðis at vit í 2015 hava eitt væl útbygt samfelag á øllum økjum; at vit teljast millum heimsins fremstu tjóðir.

## Føroyar ár 2015

Góðar útbúgvingar á øllum stigum tryggja føroyingum møguleikan fyri lívslanga læring. Tað er grundvøllurin undir okkara arbeiðsmarknaði og kappingarføri – og tískil okkara búskapi. Við tøttum samstarvi við okkara grannalond og onnur lond eru okkara útbúgvingar í 2015 á einum altjóða støði.

Lærdi háskúli Føroya hýsir einum fjølbroyttum og breiðum universitetsumhvørvi við kveikjandi samskifti og námsfrøðiligum samstarvi. Her eru allar akademisku útbúgvingarnar savnaðar. Universitetið er vorið eitt sterkt andlit bæði inneftir og úteftir.

Ein samanhangandi vegleiðaraskipan, sum fevnir um alt skúlaverkið – eisini vinnu- og yrkisútbúgvingar – tryggjar, at tað er vanligt at læra víðari og útbúgva seg gjøgnum eitt langt arbeiðslív.

Í fólkaskúlanum er fokus á tørvinum hjá hvørjum einstøkum næmingi, sum tí hevur góðar fortreytir at menna síni evni heilt frá fyrsta skúladegi. Skúlarnir eru skipaðir við økisfyrisitingum kring landið og eru við til at tryggja, at tað gongur ein reyður tráður frá barnagarði til vaksnamannnaútbúgving. At kalla allir næmingar taka miðnámsskúlaútbúgving, og 75% av okkara ungu eru undir hægri útbúgving – styttri ella longri – bæði heima og heiman.

Børn og ung í 2015 eru stinn í kjarnugreinum sum lesing, støddfrøði, náttúrulærugreinum og útlendskum málum, serstakliga enskum.

Lívslong læring er ikki einans galdandi fyri lesandi, men eisini fyri lærarar og leiðslur á skúlunum. Gjøgnum miðvísa førleikamenning megna hesi tær stóru avbjóðingarnar, sum samfelagið setur.

### Gransking elur nýmenning

Í 2015 eru Føroyar ein innbygdur partur av alheims vitanarsamfelagnum og eru vorðnar ein grundstuðul í strembanini eftir hægri vælferð og trivnaði.

Ein motorur, sum drívur samfelagið, er gransking. Føroyingar granska serliga í økjum, har vit hava góðar fortreytir at ganga á odda – millum annað matframleiðslu úr havinum. Men eisini verður granskað í ílegutøkni, mentan, samskiftistøkni og øðrum.

Vælútbúna fólkið støðast, og samfelagið stuðlar og eggjar skapanarhugi. Skapanarevni kveikja nýmenning, so granskingarúrslit verða ment til vørur, tænastur og nýggjar vinnur, sum eisini røkka langt út um landoddarnar.

Granskingin er skipað í einum sterkum bygnaði. Granskarar klekjast við føroyska universitetið eins og í útlondunum. Eitt dygdargott granskingarumhvørvi og ein granskingarlund við øllum neyðugum tekniskum útbúnaði eggjar føroyskum og útlendskum granskarum at koma til Føroya at granska.

### Hugskotsdepil

Sum íverksetanardepil eru Føroyar í 2015 ein eyðsæddur miðdepil at royna nýggj hugskot og seta nýggjar vinnur á stovn. Vit unna hvør øðrum at røkka langt og at vinna pening, tí nú vita vit, at tess størri rásarúm og møguleikar hvør einstakur fær, tess longur vinnur samfelagið framá. Íverksetarar eru fortreytin fyri nýmenning og hava tí heilt avgerandi týdning fyri áhaldandi framburð. Tí hava íverksetarar í 2015 fyritreytir fyri at savna seg um síni hugskot og at nýta orkuna til at menna tey til nýggjar vinnuvegir.

Vinnulívið er styrkt við vælútbúnum fólki, sum stimbra undir nýhugsan og íverksetan. Við einum smidligum arbeiðsmarknaði og einum vælvirkandi kappingarførum kapitalmarknaði hava vit tryggjað, at íverksetaramen-

tanin – tað at tora, vilja og royna nýggjar leiðir – stendur í fullum blóma.

Íverksetaramentanin verður løgd í skúlaungdómin frá barnsbeini. Hugskotsmenning og nýskapanarkunnleiki eru innbygd í undirvísingina, og skapanarevnini eru stimbrað gjøgnum verkætlanir, evnisdagar, spøl og kappingar.

Íverksetarahús eru sett á stovn kring landið og eru savningarstaðir hjá íverksetarum at leita sær ráðgeving um, hvussu hugskot gerast veruleiki. Hetta skapandi umhvørvið gevur íblástur og eggjar til at stovna netverk og skipa samstørv. Tað er í 2015 bæði einfalt og lætt at fáa ráðgeving og greiðu á lógum og reglum, sum galda á økinum. Somuleiðis er tað vorðið fíggjarliga eggjandi og minni vandamikið at vera íverksetari. Gjøgnum eitt breitt úrval av fíggingarmøguleikum, har sáð- og váðaíleggjarar eru týðandi táttur, er atgongd til bæði váðafúsa og tolna fígging.

Føroyar eru eitt vørumerki, eitt brand, ið er kent víða um. SamVit stendur á odda í ráðgeving fyri íverksetarar við altjóða strembanum og stuðlar undir altjóða marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum. Tað almenna leggur stóran dent á vinnuframa og stuðlar spírandi vinnum, ið framleiða slóðbrótandi vørur og tænastur og troyta nýggjar marknaðir.

### Ein heimur

Av tí at skapandi evni, útbúgving og faklig menning eru í hásæti, velja væl útbúnir føroyingar at koma heim aftur at virka, og hátøkniligar fyritøkur virka í Føroyum.

Kunningartøkni er mondulásin í okkara búskaparliga og mentanarliga kappingarføri, og tí hava allir føroyingar fingið atgongd til alnetið.

Útbúgving er ikki longur ein spurningur um, hvørji skúlatilboð eru tøk í nærøkinum, tí allir skúlar finnast á alnetinum. Tað ber tí til at útbúgva seg heima eins væl og heiman og seta saman sína útbúgving gjøgnum eitt sera breitt úrval av fakligum tilboðum við væl skikkaðum føroyskum og útlendskum lærarum.

### Ein býur

Í 2015 er skjótt og lætt at ferðast út í heim og at koma til Føroyar, eins og tað er skjótt og lætt at ferðast innanlands.

Samferðslukervið er útbygt eftir eini greiðari ætlan um, at Føroyar skulu síggjast sum ein býur. Við høvuðsvegakervi eru ymisku økini í landinum knýtt saman, so skjótt og lætt er hjá borgarum at ferðast ímillum útjaðara og miðstaðarøki. Tí ber væl til at búgva í einum øki í landinum, arbeiða og nýta tænastur og tilboð í einum øðrum.

Umstøðurnar at búleikast í Føroyum eru líkar teimum í størri býum í Evropa, tá umræður atgongd til arbeiði, tænastur og tilboð. At ferðast millum Føroyar og umheimin er sum at ferðast millum størri býir í Evropa.

### Ein arbeiðsmarknaður

Í 2015 eru Føroyar sostatt ein samanhangandi arbeiðsmarknaður, tí skipanir við ferðing, barnaansing og bústaðarmøguleikum gera tað møguligt. Tað er skjótt at

umstilla seg, lætt hjá arbeiðstakara at bjóða fram sína arbeiðsmegi og lætt hjá arbeiðsgevara at fáa røttu arbeiðsmegina.

Á arbeiðsplássinum verður dentur lagdur á trivnað, og sjúkufráveran er tí lækkað munandi í mun til áður. Lívslong læra og førleikamenningarskipanir eru lyklaorð í eini áhaldandi menning av arbeiðsmarknaðinum, ið fevnir um øll – frá ófaklærdum til hægstu leiðarar.

Umframt hetta gevur ein rúmligur arbeiðsmarknaður samfelagnum økta úrtøku, tí allar kreftir eru við til at lyfta – eisini fólk við skerdum førleikum, ið áður ikki høvdu stórar møguleikar á arbeiðsmarknaðinum.

### Eitt andlit úteftir

Føroyar eru í 2015 ein spennandi og øðrvísi miðdepil í Norðuratlantshavi; ein smátjóð, har fólk og hav eru eitt. Føroyar hava sendistovur kring heimin í londum sum Russlandi, USA og Sveis, har vit hava eitt virkið mentanarligt og vinnuligt samstarv.

Føroyar hava sostatt eitt greitt og sjónligt andlit í altjóða samfelagnum, eru partar av innmarknaðinum hjá Evropa og eru virkin í evropiskum menningarætlanum fyri mentan, útbúgving og gransking. Somuleiðis eru Føroyar virkin limur í heimshandilsfelagsskapinum WTO og øðrum altjóða felagsskapum.

### Mentan ein kappingarstyrki

Í 2015 eru skapanarevni og skapanarhugur millum mest eftirspurdu førleikarnar á arbeiðsmarknaðinum. Landamørk hava ikki longur sama avgerandi týdning, tí heimurin allur er ein felags fatanarkarmur, og list á altjóða støði ein natúrligur partur av mentanartilboðunum.

Av tí at mentan og list nú eiga heiðurligan part av landsins bruttotjóðarúrtøku, og at list er ein innbygdur partur av okkara útbúgving, er kappingarførleiki Føroya sterkur á hesum økinum.

Mentanarráð Føroya er karmur um samstarv og netverk og gevur Løgtingi og Landsstýri holla ráðgeving um mentanarpolitikk. Tjóðsavnið tryggjar mentanararv Føroya, og í Tjóðleikhúsinum mennist landsins leiklist og tónlist. Børn og ung hava møguleika at ganga á mentanarskúla og ítróttarháskúla, samstundis sum ítróttar- og rørsludeplarnir kring landið eggja okkum øllum til at vera virkin og sostatt styrkja fólkaheilsuna.

### Umhvørvið ein kappingarstyrki

Í 2015 hava Føroyar vunnið sær umdømi sum eitt ábyrgdarfult land, sum virkið arbeiðir fyri reinum umhvørvi – heima og heiman. Føroyar luttaka beinleiðis í altjóða umhvørvisarbeiði við at verja náttúru, havumhvørvi og lívfrøðiligt margfeldi – í gerð, ikki einans í orði. Bæði tað almenna og privata tekur umhvørvi við í sínar ætlanir, og øll dálkandi virki hava fingið umhvørvisskipanir. Útlátið av veðurlagsgassum eru munandi minni enn fyri fáum árum síðani, og fleiri sløg av øðrvísi orkukeldum eru komin á marknaðin.

Umhvørvisumsitingin er sterk og hevur tí orku og møguleika at fremja teir sáttmálar á umhvørvisøkinum, Løgtingið hevur samtykt. Harumframt eygleiðir umsitingin dálkingarstøðuna, støðuna hjá ymiskum plantu- og

djórasløgum og setir verndartiltøk í verk, tá hetta er neyðugt. Tíðarvísar umhvørviskanningar og hagtøl gera, at hetta arbeiði fer neyvt og sakliga fram.

Eins og nógv onnur samfelagsøki er umhvørvið innbygt í undirvísingina í fólkaskúlanum, og flestu skúlar og barnagarðar hava í 2015 vunnið sær rætt til heitið »grønur skúli«. »Eitt umhvørvistilvitað fólk er eitt umhvørvistilvitað land«, er slagorðið. Tí er upplýsing gjøgnum skúlaverkið eins og vanlig upplýsing ein týðandi táttur í umhvørvisarbeiðnum.

### Sjálvbjargin vinna

Tilfeingisvinnurnar – fiski-, ali-, oljuvinna og landbúnaður – geva ein góðan og støðugan búskaparligan vinning, samstundis sum tær halda seg innan fyri teir karmar, ið eru ásettir sum burðardyggir. Ein gjøgnumgangandi táttur í hesum er granskingin, har tað almenna og vinnan samstarva tætt, bæði viðvíkjandi gagnnýtslu av verandi tilfeingi og menning av nýggjum framleiðsluhættum. Gransking er vorðin sjálvsagdur partur av øllum vinnurakstri.

Í fiskivinnuni er tað vinnan, sum í størstan mun sjálv leggur øll viðurskifti til rættis uttan tær áður so darvandi avmarkingarnar til eitt nú stødd á skipum, og hvar í landinum virkir eru, og vøra verður tilvirkað. Men framvegis hava myndugleikarnir ábyrgdina av at stýra yvirskipaða veiðutrýstið og verja fiskastovnarnar.

Loyvini at troyta fiskatilfeingið verða latin á einum skipaðum marknaði, har landið er seljari, og har tey, ið fáa rættindini at gagnnýta náttúrutilfeingið, gjalda eitt rímiligt gjald fyri hesi rættindi. Samstundis sum landskassin fær nøktandi inntøku av hesum rættindum, tryggjar skipanin, at tað altíð eru tey við tí besta kappingarførinum, ið hava loyvini, og tryggjar á tann hátt eitt framleiðsluvirkið og mennandi vinnulív.

Alivinnan og landbúnaðurin eru skipað í stórar og munadyggar eindir við góðari framleiðsluorku.

### Hollur samfelagsbygnaður

Føroyar byggja á ein opnan og burðardyggan marknaðarbúskap grundfestur í vælferðarsamfelagnum. Avgerðir og ábyrgd eru nær borgarunum, og allar samfelagsligar uppgávur verða loystar við størstu virðisskapan.

Í 2015 eru ongar almennar vinnufyritøkur, og studningsskipanir til vinnulívið eru avtiknar, uttan tær heilt fáu, har tað er prógvað, at tað gevur eitt meirvirði til samfelagið. Allir borgarar og allar vinnur hava sostatt somu fortreytir, og tí er vinnan sera framleiðsluvirkin, munadygg og kappingarfør.

Miðfyrisitingin er savnað á einum staði, har breiður fakligur førleiki er savnaður og vitanargrundarlagið tí sterkt og munadygt. Umframt hetta er landið savnað í sjey kommunalar eindir, ið saman við eini góðari samskipan og vælskipaðum samskifti veita borgarum meira fyri minni. Fíggjarliga útjavningarskipanin ger tær sjey kommunurnar nøkulunda javnsterkar fíggjarliga og sostatt nóg sterkar at røkja sínar kjarnuuppgávur.

Mál- og avriksstýring ber í sær eina miðvísa stýring av almenna virkseminum. Opinleiki og innlit geva borgar-

um møguleika at meta um, hvørt almennir stovnar røkja sínar uppgávur og røkka settum málum.

### Borgarin í miðdeplinum

Fyri at borgarin skjótt og lætt kann koma til, eru allar tænastur á heilsu-, almanna- og skúlaøkinum skipaðar í økistænastudeplar.

Trivnaðurin hjá borgaranum er snúningsásin í øllum politiskum átøkum. Tí er eitt vælferðarráð sett á stovn, ið hevur eitt vakið eyga við førda vælferðarpolitikkinum. Harumframt er eitt barna- og ungdómsráð, ið tryggjar børnum og ungum bestu kor og umstøður at vaksa upp og mennast.

Rúmd er hjá hvørjum einstøkum fyri at menna egin evni, og hvør og ein borgari hevur møguleika at geva sítt íkast eftir førimuni, og er í mesta mun fíggjarliga sjálvbjargin. Hetta ber til, tí vit nú seta fokus á, hvat hvør einstakur kann og ikki, hvat viðkomandi ikki kann, soleiðis sum siðvenjan hevur verið. Eisini tryggjar nýggja eldralógin rættindini hjá teimum gomlu í samfelagnum, sum alt lívið varðveita eitt rímiliga gott livistøði við tryggari eftirløn.

At fremja heilsu og fyribyrgja sjúkur er í 2015 ein grundleggjandi partur av heilsuskipanini – og inngrógvið í okkara siðvenjur, av tí at trygd og kunning til borgaran eru sett í hásæti, m.a. sum ein innbygdur partur av undirvísingini av okkara børnum heilt frá barnagarðsstøði. Granskað verður í heilsu- og almannaviðurskiftum og luttikið verður í granskingarsamstarvi í Norðurlondum og í ES. Tað gevur millum annað holla vitan um samanhangir millum lívsvátt og heilsu. Sum heild hevur borgarin í 2015 fulla nyttu av væl útbygda heilsuverkinum.

Hetta er framtíðarmyndin av samfelagi okkara í høvuðsdrøgum. Visjón 2015 vísir eitt samfelag, ið er ment, broytt og væl útbygt á øllum økjum – tí teljast Føroyar millum fremstu tjóðir.